# BP og Shell stórt avlop

Bretsku British Petroleum og Shell hava fingið nógv burtur úr tí góða prísinum á ráolju. Tølini fyri fyrsta ársfjórðing vísa, at Shell hevði 7,7 mia. dollarar í avlopi hesa tíðina, og hjá BP var talið 6,6 mia. dollarar. Hjá Shell er talan um ein vøkstur upp á 12 prosent samanborið við somu mánaðir í fjør, og hjá BP er vøksturin heili 50 prosent. Bretskir fjølmiðlar vænta, at fólk fara at ilskast inn á avlopið, tí tað er dýrt at keypa olju og bensin í Bretlandi.



*Avlopið hjá BP fyrsta ársfjórðing vaks heili 50 prosent (Mynd: DR)*

# Rennur í ríkiskassan

Tann góði oljuprísurin kemur danska ríkiskassanum væl við. Børsen skrivar, at við verandi príslegu fær ríkiskassin væntandi einar 10 milliardir krónur mneiri burtur úr oljuni enn væntað, og tað hevur samstundis við sær, at avlopið hjá ríkiskassanum fer upp um 85 milliardir krónur í ár. Tá fíggjarmálaráðið metti um oljuinntøkurnar, varð roknað við, at prísurin fór at liggja um 88,5 dollarar, men higartil í ár hevur hann verið 112 í meðal.



*Bátafestivalurin á Toftum er vaksin á hvørjum ári, og háttar veðrið sær so nøkulunda leygardagin, er væntandi, at nógvir bátar kring um úr landinum fara at stevna inn á Skálafjørðin, har bátarnir skulu møtast í Skálafirði klokkan 12.30. Um 13-tíðina verður kósin sett út á Toftir*



*Um 15-tíðina leygardagin stevna bátarnir inn í Oyrahavnina á Toftum. Bátafelagið bjóðar heita suppu og okkurt leskandi í matarhøllini hjá Faroe Seafood, og tá fer eisini harmonikuliðið at undirhalda við veitslu-og hátíðarkendum tónum*

um og fólki við áhuga fyri bátum í kommununi so góðar umstøður sum gjørligt, bæði teimum sum hava vinnuligar bátar, men eisini – og ikki minst – tá ræður um silging og siglingarsøgu.

Felagið strembar eisini eftir at fáa eitt undirhús til hugnaliga samveru millum bátaeigarar og fólk við áhuga fyri bátum og sigling.

Sammarittarnir hjá Reyða Krossi verða á økinum við sínum vaktar-og hjálparfólki, meðan bátafestivalur er á Toftum.

Hetta er ein tryggleiki, sum hevur stóran týdning fyri slík tiltøk, sum ein bátafestivalur er.

### Nógv ymisk tiltøk

Nýggja tjaldið hjá Bátafelagnum verður tikið í nýtslu á festivalinum, og hetta verður karmurin um ein stóran part av tiltøkunum.

Á festivaløkinum verða hoppiborgir, karusell, trampolin og smáir bilar til tey smæstu.

Pylsuvognurin, ið er so forkunnugur um hesar leiðir, hevur opið til langt út á náttina, og góðir kokkar fara eins og undanfarin ár at kynda undir grillina og selja vælsmakkandi búffar við øllum tilhoyri.

Afturvendandi tiltakið, sum er meksikanska uppboðsølan, har vinnulívsfólk eru komin undir sjóneykuna og spíska blíantin hjá Martini W. Tórgarð, verður eisini á skránni. Tað verður løgtingsmaðurin, Bill Justinussen, sum skipar fyri søluni.

Leygarkvøldið verður so dansur við Dansiorkestrinum, og hetta tiltak plagar at savna nógv fólk á festivalinum.

# 94 metrar av nýggjari atløgu

**Nýggja atløgusíðan á Toftum, sum er 94 metrar long við einum dýpi, sum í minsta lagi er 7 metrar, varð alment tikin í nýtslu flaggdagin**

ATLØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin, Símun Johannesen, heldur røðu*

Tað er J&K Petersen, sum hevur staðið fyri arbeiðnum, EM-Asfalt hevur asfalterað bryggjuøkið, og Elvirkið hjá Jóhan Gaard hevur staðið fyri el-teknisku veitingunum á økinum.

Nes kommuna hevur brúkt 8,5 miljónir krónur til arbeiðið, sum er ein munandi bati fyri karmarnar hjá øllum tí virksemi, sum er á havnalagnum á Toftum.

Kommunan skipaði fyri hátíðarhaldi, har Nes sóknar Hornorkestur spældi nøkur løg, meðan trolbátarnir Randi, Búgvin og Hansa Maria løgdu at við nýggju bryggjuna.

Síðan helt borgarstjórin, Símun Johannesen, røðu vegna kommununa.

Eftir hátíðarhaldið bjóðaði kommunan øllum til kaffi og køkur í hølunum hjá Snodd. Seinni bjóðaði kommunan so døgurða í hølunum hjá Vesturskin fyri arbeiðstakarum og umboðum fyri virkir og bátar.

Sum formaður í teknisku nevnd hjá kommununi, er Súni í Hjøllum sera væl nøgdur við arbeiðið, sum er gjørt.

- Við tí nógva virkseminum, sum er á havnalagnum, verður hetta ein munandi bati. Eg vil bera øllum, sum hava arbeitt við hesi verkætlan, eina støra tøkk og ynskja borgarunum í Nes kommunu tillukku við atløgusíðuni, sigur formaðurin í teknisku nevnd.

Símun Johannesen, borgarstjóri, segði, at tað, sum hevur eyðkent tey fólk, sum hava búleikast í kommununi, er áhugin fyri sjónum og tí sum havið gevur.

- Hetta kom longu til kennar fyri gott hundrað árum síðani, tá tann fyrsta sluppin varð keypt inn á Nes, og síðani komu fleiri eftir. Vit fingu størri og minni reiðarar, sum góvu nógv arbeiði og sum soleiðis gjørdist fíggjarliga grundarlagið fyri nógvar familjur.

Hann segði, at tá sluppirnar vóru komnar, skaptist tørvurin fyri atløgusíðum.

- Her vóru eingi havnaløg, har sluppirnar kundu leggja til bryggju, segði borgarstjórin í einari áhugaverdari røðu, har hann tók støði í søguni aftanfyri kommuna og vinnulívinum, sum seinni prýkti úr áhuganum hjá fólki á staðnum fyri sjógvi og sigling.



*Nes kommuna hevur nú fingið eitt uppaftur betri og tiltrongt havnalag*